




Mary Jane Dorothy Weingarden (Dot)
Fødd: Århus 30. april 1943

## Innbjóðing til fernisering

mánadagin, 19. apríl 2010 kl. 17 - 20

**Starvsmannagelagið**
J.H. Schrødersgøta 9, Tórshavn

Mennesker i lyset,
mennesker i mørket,
lys, skygge,
op ad evighedens trappe,
børn der leger,
katte,
manden der jager lys,
i skygge, fantasien skal flyve,
ågne, forføre
og inspirere

# KJ Hydraulik søkir skrivstovulærling

Vit søknast eftir ágrítnum, nærlagdum og álítandi lærlingi til skrivstovu okkara á Kambsdali. Sum lærlingur hjá okkum kemur tú at fáa eitt breitt innlit í skrivstovuarbeiði, og kemur eisini at hava ábyrgd av ymiskum uppgávum.

Tú ert um at vera liðug/ur- ella hevur longu tikið eina miðnámsútbúgving, og ert opin fyri at útbúgva teg víðari innan skrivstovu- og fyrisitingarøki. Tú hevur áhuga í bókhaldsarbeiði, og ert ikki bangin fyri at læra og menna teg. Tú hevur telduførleika og førleika at orða teg í skrift og talu á føroyskum, donskum og enskum. Tú hevur góð samstarvsevni, dámar at arbeiða tætt saman við øðrum og fýrir ikki fyri at taka ábyrgd, og geva eitt sindur eyka, tá tørvur er á tí.

KJ Hydraulik er ein spennandi fyritøka í støðugari menning. Á okkara maskinverkstøðum arbeiða uml. 40 handverkarar og lærlingar, og harumframt hava vit eina vælvirkandi sølu- og tænastudeild, goymslu og fyrisitingardeild. KJ Hydraulik heldur til á Kambsdali, Fuglafirði og í Tórshavn.

Umsóknir, við avriti av prógvum og viðmælum skulu sendast okkum í seinasta lagi 28. apríl 2010, og kunnu sendast umvegis teldupost ella til:

KJ Hydraulik
Fagragil 1, Kambsdalur
Postboks 110
FO-530 Fuglafjørður

Um tú hevur spurningar, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Arna K. Abrahamsen, fíggjarleiðara, á tlf. 407015 ella teldupost aka@kj.fo

Starvið verður sett eftir nærri avtalu.

reset.fo

KJ HYDRAULIK
POWER & MOTION CONTROL

Postsmoga 110 · Kambsdalur · Tel 407000 · Faks 407001 · info@kj.fo · www.kj.fo

Kvinnurenningin 2010



## Bragdið og Kvinna skipa fyri

# Kvinnurenning

## í Tórshavn tann 5. juni

**Kom í venjing til kvinnurenningina**

Bragdið hevur aftur í ár eitt framúr gott venjingartilboð til allar kvinnur, sum vilja koma í venjing til kvinnurenningina. Tilboðið er ókeypis og hóskar væl til bæði royndar og óroyndar kvinnur.

Venjing á Tórsbreyt leygarmorgun kl. 8:30 og hósdag kl. 17:00.

Leygarmorgun venja vit léttar túrar har skift verður millum at renna og ganga. Hósdag venja vit renniteknikk og styrki.

Fyrsta venjing verður á Tórsbreyt leygardagin 10. apríl og vit halda á fram til hósdagin 3. juni. Tilmelding er ikki neyðug.

**Kvinnudeildin hjá Bragdinum**